# **Orgulkonsert** í Fuglafjarðar kirkju

**Fríggjakvøldið 12. juni klokkan 20 verður orgulkonsert í Fuglafjarðar kirkju við føroyskum organistum**

**ORGULKONSERT**

Tíðindaskriv

Heðin Kambsdal, Oddvør Johansen, Gudmund Mortensen og Jens Mortan Mortensen fara at hava orgulkonsert í Fuglafjarðar kirkju fríggjakvøldið 12. juni. kl. 20:00. Hetta er í samband við fagnaðin, sum er í juni mánaði í Fuglafirði, har kirkjan fyllir 25 ár, Fuglafjarðar hornorkestur og Málningaframsýningin á Varmmakelda fylla 40 ár.



**Heðin Kambsdal fer at spæla:**
**G. Walther. Partita: Jesu meine Freude**
**B. Sløgedal. Partita: Norskt fólkalag**
**Heðin Kambsdal hevur verið organistur í Bangsbo strand kirke í Fredrikshavn til 1997. Heðin Kambsdal er føddur í Fuglafirði 14. 03. 51 og er nú organistur í Fuglafjarðar kirkju.**



**Oddvør Johansen fer at spæla:**
**Føroyskan tónleik og tvey koralforspøl av Jesper Madsen.**
**Tað fyrra er: Når mit øje træt af møje, sálmur eftir Brorson 1741 og tað seinra er: Kærlighed er lysets kilde av Grundtvig 1853. Afturat hesum spælir Oddvør fugu í F-dur av Buxtehude.**
**Oddvør hevur verið organistur í mong ár í Havnar kirkju, men er nú organistur í Hoyvíkar kirkju.**



**Gudmund Mortensen fer at spæla:**
**Variatiónir yvir eitt franskt jólalag av Claude-Bénigne Balbestre(1727-1799)**
**Olivier Messiaen: Apparition de l'Eglise éternelle(framkoma av tí ævigu kirkjuni)**
**Gudmund hevur verið organistur og kórleiðari í Fredens kirkju í Herning og í Ikast kirkju. Síðani 2007 organistur í Havnar kirkju.**



**Jens Mortan Mortensen fer at spæla:**
**2 orgulkoralir: Harra Guð títt dýra navn og æra**
**Eg skar mítt navn**
**2 præludium: Postludium fyri styrdar fingrar nr. 2**
**Postludium fyri stirdar fingrar nr. 5**
**Jens Mortan hevur verið organistur á Tvøroyri síðani 1998 og í Hvalba síðani 2004.**

**Keypmannahavn t/r við gisting**

Kostnaður pr. pers.
**úr kr. 4.175,-**



Íroknað prísin er ferð til Keypmannahavnar t/r við gisting í dupultrúmi á Hotel Hilton í tríggjar nætur.
Tilboðið er galdandi, um tit ferðast ímillum 03.juli og 23.aug, og eru vekk náttina ímillum leygardag og sunnudag.

FONN FLOG
KLAKSVÍK · TEL. 47 63 63
SALTANGARÁ · TEL. 47 63 83
WWW.FONNFLOG.FO

**Et, sigl og uppliv hjá Vestmanna Tourist Center**



Tú kanst eta á Fjørukrónni áðrenn ella aftaná túrin og vitja nýggja Søgusavnið

Ring og spyr um tilboð á tel. 28 15 00 ella les meira á www.puffin.fo
SJÓFERÐIR Skúvadal spf

**Kap- geringssag til træ og metal**



Sp/f Maskinhandilin
Heiðavegur 24
600 Saltangará
Tlf. 44 77 77

